

*Eini 600 fólk í gudstænastu í ítróttarhøllini á Skála sunnumorgunin*

*Mynd: Maria Olsen*

# 600 fólk til gudstænastu á Skála

**Stóra undirtøkan fyri ársmøtunum hjá Heimamissiónini hevði við sær, at gudstænastan sunnumorgunin varð flutt í ítróttarhøllina á Skála. Vanligt er hon í Norðstreymoyar kirkju, men við 600 fólkum, var tað ikki møguligt**

HEIMAMISSIÓNIN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Sverri Steinhólm, prestur, er ein av teimum, sum hevur fyrireikað 100 ára haldið og ársmøtini hjá Heimamissiónini. Hann dylir ikki fyri, at 100 ára haldið ivaleyst er orsøkin til nógvu fólkini, men samstundis leggur hann eina við, at tað vanliga eru nógv fólk til ársmøtini hjá Heimamissiónini.

– Tað plagar ikki at vera nakar trupulleiki at fáa fólk at møta upp til ársmøtini, sigur hann.

Orsøkin til, at gudstænastan varð flutt yvir í ítróttarhøllina á Skála var heilt einfalt, at tað vóru ov mong fólk.

– Tað bar snøgt sagt ikki til at halda gudstænastuna og møtið leygarkvøldið í leguhúsinum, tí tað var ikki pláss, greiðir Sverri Steinhólm frá.

Byrjað varð í Nesvík fríggjakvøldið við møti. Leygardagin var sjálvur ársfundurin. Síðani varð flutt út í ítróttarhøllina á Skála, tí ov lítið pláss var í Nesvík.



*Bergur Debes Joensen, prestur helt prædikuna undir gudstænastuni*

*Mynd: Maria Olsen*



*Ung sum gomul hittust til ársmøtini hjá Heimamissiónini, og øll hildu, at tað eydnaðist væl at halda gudstænastuna í ítróttarhøllini*

*Mynd: Maria Olsen*

## Vanlig gudstænasta

Hóast karmarnir ikki vóru ein kirkja, so bar væl til at halda gudstænastu í ítróttarhøllini. Fyrireikararnir fingu tó onkra viðmerking um hetta, men aftaná vóru øll glað og vælnøgd.

Onkur helt enntá fyri, at hetta átti at verðið gjørt hvørjaferð, tí tað var so nógv rúmsháttari og kundi harvið savna so mong fólk.

Gudstænastan í ítróttarhøllini var júst sum ein vanlig gudstænasta í kirkjum. Eitt altar varð gjørt, og ein urga spældi undir sálmasanginum. Hartil vóru øll tey vanligu liðini, so tí var hendan gudstænastan ikki petti øðrvísi enn ein vanlig. Tríggir prestar vóru við. Emil Olsen prestur á Eiði helt fyrsta partin av gudstænastuni, Bergur Debes Joensen, prestur í Vesturkirkjuni helt prædikuna og so hevði Sverri Steinhólm altartænastuna. Eini 350 fólk fóru til altars hendan dagin, so tað hevur somuleiðis verið talan um eina heilt stóra altargongd.

Bæði bispur og Jógvan Fríðriksson vórðu bodnir við til ársmøtini, men tað vildi so illa til, at báðir vóru staddir uttanlanda og bóru seg tí undan.

## Háborgin

Sverri sigur, at tað eru summi, sum halda, at kirkjan er heilag í sjálvum sær.

– Tað er hon sjálvandi, hon er jú vígd og so framvegis. Men vit skulu minnast til, at tað fyrst og fremst er Guds orð, sum er heilagt, og tí mugu karmarnir ikki vera til hindurs fyri, sigur hann.

Onki annað stað í Eysturoynni kundi nýtast til at hýsa hesum, sigur Sverri, tí tey ynsktu fyrst og fremst at vera verandi í umhvørvinum har.

– Skálafjørðurin má sigast at vera háborgin fyri Heimamissiónini við sínum sjey meinigheitshúsum kring fjørðin, so tað vildi verið løgið at flutt gudstænastuna og restina av ársmøtunum ov langt frá staðnum, heldur prestur fyri. Tað gjørdi so eisini sítt til, at flutt varð í ítróttarhøllina.

Sverri sigur seg ikki vita, um hetta verður aftur, men hann greiðir frá, at Heimamissiónin arbeiðir við ætlanum um at útbyggja Leguhúsið í Nesvík. Upprunaliga tekningin vísir, at har skuldu vera bæði matarhøll og salur. Í dag savnast tey í matarsalinum til møtir og annað, men er ætlanin hjá Heimamissiónini at byggja salin og nøkur kømur afturat fyri betur at kunna hýsa teimum størru tiltøkunum og at lætta um yvirhøvur, tá bygdalegur og onnur tiltøk eru í Nesvík.



# Lisa Ekdahl spælir í Gøtu



**Kenda svenska songkvinnan verður eitt av høvuðsnøvnunum á G! festivalinum, sum verður hildin í Gøtu í summar**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

– Vit kunnu við stoltleika kunngera at eitt av høvuðsnøvnunum á G! Festivalini í ár verður svenska Lisa Ekdahl.

Soleiðis vórðu boðini, sum fyrireikararnir av G! festivalinum sendu út í gjár. Ivin um, hvørt festivalurin skuldi haldast í ár, er nú avloystur av stoltleika um eitt spennandi svenskt høvuðsnavn.

## Virt navn

Lisa Ekdahl kom fram í 1994, tá ið hennara fyrsta útgáva seldi slaka hálva millión eintøk, og sangurin Vem Vet var nógv spældur – eisini á okkara leiðum.

Lisa Ekdahl hevur síðani Vem Vet ment seg bæði persónliga og tónleikaliga. Við seks ummælararóstum fløgum í skjáttu síni og fleiri heiðursprísum, er hon vorðin eitt hitt mest virda norðurlendska navnið á altjóða tónleikapallum seinastu árini.

Framførslan hjá Ekdahl á G! Festivalini í ár verður fyrstu ferð nakrantíð, at svenska songkvinnan verður at hoyra live í Føroyum.

## Gospel úr USA

Fyrireikingarnar til festivalin í Gøtu eru av álvara farnar í gongd nú, og umframt svenska høvuðsnavnið hava fyrireikararnir eisini boða frá, at amerikumaðurin Russ Taff, sum millum annað er kendur úr bólkinum Imperials, kemur at spæla.

Umframt útlendsku nøvnini verða eisini nógvir føroyskir tónleikarar við á festivalinum, sum verður hildin í døgunum 16. og 17. august.

# Laksaprísurin ikki verið so høgur síðan 2001

**- Men miðalprísurin er ikki hægri enn tað, at vit nú selja við einum lítlum avlopi, sigur Atli Gregersen, stjóri í alifelagnum, P/F Luna**

LAKSAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

*- Tað er greitt, at tá ið alivinnan hevur mist sín eginpening, er neyðugt við einum prísi, sum ikki er lægri, enn hann er í dag, sigur Atli Gregersen, stjóri í alifelagnum, P/F Luna*



Stjórin í alifelagnum, P/F Luna, sigur, at teir laksaprísir, vit hoyra um í Noregi, kunnu tykjast eitt sindur misvísandi. Norska krónan er lægri enn hin føroyska, soleiðis at her er ein kursmunur uppá 10%.

- Tá ið vit hoyra úr Noregi, at miðalprísurin á kruvdum laksi er einar 24 krónur fyri kilo, so svarar hetta til 21,60 krónur í Føroyum. Hetta er júst tað, sum vit í miðal fingu fyri kruvdan laks í síðstu viku, sigur Atli Gregersen.

## Eitt miðaltal

Hann fegnast tó um, at bati hevur verið í prísinum í seinastuni, og bara síðan í fjør heyst, er talan um ein prísmun uppá nakrar krónur fyri kilo.

- Eftir álopið á New York, fullu laksaprísirnir, og tað er ikki fyrr enn nú, teir eru komnir uppaftur á sama støði, sum teir vóru tá.

Atli sigur, at tá ið hann nevnir eitt tal, sum er 21,60 fyri kilo, er hetta eitt miðaltal fyri ymiskar støddir og dygdir av kruvdum laksi.

- Tær bestu støddirnar hava tá ein væl hægri prís enn miðalprísurin er, sigur hann.

## Hongur saman

Atli vísir á, at eitt hampiliga væl rikið virkið klárar í løtuni at framleiða eitt kilo av laksi fyri einar 20 krónur.

- Tí selja vit nú við einum lítlum avlopi. Hinvegin er greitt, at tá ið alivinnan hevur mist sín eginpening, er eisini neyðugt við einum prísi, sum ikki er lægri, enn hann er í dag. Tí kunnu vit bert vóna, at uppgongdin, sum verið hevur, stendur við, soleiðis at tað aftur fer at løna seg at framleiða og selja laks, sigur Atli Gregersen, stjóri í P/F Luna.

